**Kristina Háfoss**
**vegna Tjóðveldi**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 21/2019: Uppskot til løgtingslóg um upplýsing um privatan stuðul til politiskar flokkar, løgtingslimir og valevni**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um upplýsing um privatan stuðul til politiskar flokkar, løgtingslimir og valevni

**§ 1.** Flokkar skulu leggja fram roknskap, har upplýst verður um, hvørjar inntøkur flokkurin hevur, og hvaðan hesar stava, herundir hvør hevur latið privatan stuðul til flokkin, løgtingslimir og valevni til løgtingsval. Uttanflokka løgtingslimir og valevni til løgtingsval skulu almannakunngera privatan stuðul sambært hesi lóg umvegis frágreiðing.

*Frágreiðingar frá flokkum, løgtingslimum og valevnum*

**§ 2.** Flokkar, ið hava verið uppstillaðir til seinasta løgtingsval, skulu leggja fram roknskap fyri flokkin. Roknskapurin skal fevna um upplýsingar um hesar inntøkur:

1. Almennan floksstuðul

2. Inntøkur frá limagjaldi

3. Rentuinntøkur

4. Stuðul frá altjóða felagsskapum, privatum felagsskapum, fakfeløgum, vinnuligum felagsskapum, vinnufyritøkum, grunnum og feløgum.

5. Annan privatan stuðul

*Stk. 2.* Um ein flokkur, í roknskaparárinum, sbrt. § 3, stk.1, fær stuðul eina ferð ella fleiri ferðir frá sama privata stuðulsveitara, ið samanlagt hevur virði á 5.000 kr. ella meira, skal navn og bústaður hjá stuðulsveitara síggjast í roknskapinum. Roknskapurin skal hartil fevna um upplýsingar um samlaðu upphæddina frá møguligum dulnevndum stuðlum, og upplýsingar um upphæddina, ið hvør einstakur dulnevndur stuðul hevur latið, um talan er um stuðul, ið hevur virði á 5.000 kr. ella meira.

*Stk. 3.* Um løgtingslimur ella valevni, í roknskaparárinum, sbrt. § 3, stk.1, fær stuðul eina ferð ella fleiri ferðir frá sama privata stuðulsveitara, ið samanlagt hevur virði á 3.000 kr. ella meira, skal navn og bústaður hjá stuðulsveitara og stuðulsmóttakara síggjast í frágreiðing, ið fylgir við roknskapinum hjá politiska flokkinum. Frágreiðingin til roknskapin skal hartil fevna um upplýsingar um samlaðu upphæddina frá møguligum dulnevndum stuðlum og upplýsingar um upphæddina, ið hvør einstakur dulnevndur stuðul hevur latið einstøkum løgtingslimi ella valevni, um talan er um stuðul, ið hevur virði á 3.000 kr. ella meira.

*Stk. 4.* Um løgtingslimur ella valevni, sum er uttanflokka, í roknskaparárinum sbrt. § 3, stk. 1 fær stuðul eina ferð ella fleiri ferðir frá sama privata stuðulsveitara, ið

samanlagt hevur virði á 3.000 kr. ella meira, skal navn og bústaður hjá stuðulsveitara og stuðulsmóttakara síggjast í frágreiðing, ið løgtingslimur ella valevni skal lata fyrisitingini hjá Løgtinginum. Frágreiðingin skal hartil fevna um upplýsingar um samlaðu upphæddina frá møguligum dulnevndum stuðlum, og upplýsingar um upphæddina, ið hvør einstakur dulnevndur stuðul hevur latið einstøkum løgtingslimi ella valevni, um talan er um stuðul, ið hevur virði á 3.000 kr. ella meira.

*Stk. 5.* Roknskapurin hjá flokkum skal fevna um upplýsingar um javna og eginogn.

**§ 3.** Roknskapur hjá flokkum skal leggjast fram fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember.

*Stk. 2.* Roknskapurin skal undirskrivast av floksleiðsluni, og skal fevna um eina váttan um, at flokkurin ikki hevur havt aðrar inntøkur enn tær, ið upplýst er um í roknskapinum.

*Stk. 3.* Frágreiðingar frá uttanflokka valevni ella uttanflokka løgtingslimi sbrt. § 2, stk. 4 skulu undirskrivast av viðkomandi valevni ella løgtingslimi.

**§ 4.** Leiðslan hjá flokkinum sendir í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at roknskaparárið er lokið, Løgtinginum eitt avrit av roknskapinum.

*Stk. 2.* Uttanflokka valevni ella uttanflokka løgtingslimur, ið fær privatan stuðul sbrt. § 2, stk. 4, sendir í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at roknskaparárið er lokið, Løgtinginum frágreiðing sbrt. § 2, stk. 4.

*Stk. 3.* Almenningurin kann, við at venda sær til Løgtingið, síggja roknskapirnar hjá politisku flokkunum og frágreiðingar frá uttanflokka løgtingslimi ella uttanflokka valevni.

*Revsing*

**§ 5.** Uttan so, at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, verður tann revsaður við bót, sum

1) gevur skeivar ella manglandi upplýsingar sbrt. § 2,

2) gevur ósanna váttan sbrt. § 3, stk. 2.

*Stk. 2.* Politiskir flokkar (juridiskir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd eftir revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Neyðugt er við fullum gjøgnumskygni, tá umræður tann stuðul, ið politiskir flokkar, løgtingslimir og valevni fáa.

Endamálið við lógini er at tryggja, at almenningurin altíð kann fáa fult innlit í, hvussu politiskir flokkar, løgtingslimir og valevni fíggja valstríð og virksemi teirra, herundir hvør privatur stuðul verður latin flokkum, løgtingslimum og valevnum.

Hetta verður gjørt við, at politiskir flokkar skulu gera roknskap, ið eitt nú skal fevna um upplýsingar um inntøkukeldur og stuðul floksins. Herundir upplýsingar um møguligan privatan stuðul. Eisini skal í frágreiðing til roknskapin upplýsast, um løgtingslimir ella valevni floksins fáa privatan stuðul samsvarandi hesi lóg.

Um talan er um uttanflokka valevni ella uttanflokka løgtingslim, og viðkomandi fær privatan stuðul samsvarandi hesi lóg, skal viðkomandi lata fyrisitingini hjá Løgtinginum frágreiðing um møguligan stuðul.

Almenningurin kann fáa innlit í roknskapir hjá politisku flokkunum og frágreiðingar frá uttanflokka valevnum og løgtingslimum hjá fyrisiting Løgtingsins.

Í dag eru politiskir flokkar, løgtingslimir og valevni ikki áløgd at upplýsa alment um møguligan privatan stuðul. Hetta ger, at almenningurin ikki veit um og í hvønn mun politiskir flokkar, løgtingslimir og valevni eru privat stuðlað og harvið hava fíggjarligt tilknýti til privatar stuðlar.

Hetta lógaruppskot fer at broyta hesa støðu og tryggja innlit í, hvørjar inntøkukeldur og hvønn stuðul politiskir flokkar hava, og um valevni og løgtingslimir eru fíggjað av privatum stuðlum.

Harvið gerst gjøgnumskygnið og rættartrygdin størri í politisku skipanini í Føroyum.

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar

Uppskotið hevur ikki nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Ein møgulig avleiðing kann verða, at nakrir núverandi privatir stuðlar ikki vilja stuðla flokkum ella valevnum, um hetta skal upplýsast alment.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Fyri fyrisitingina hjá Løgtinginum kann hetta merkja, at fleiri fara at biðja um innlit í roknskapirnar hjá politisku flokkunum, ið Løgtingið skal veita fult innlit í. Fyri politisku flokkarnar kann hetta merkja, at størri arbeiðsorka skal leggjast í roknskapin. Eisini skulu løgtingslimir og valevni frameftir upplýsa, tá hesi fáa privatan stuðul samsvarandi hesi lóg.

### 2.3. Fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

## 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

## 2.5. Fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

## 2.6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Tó kann uppskotið møguliga broyta inntøkur hjá politiskum flokkum og valevnum frá privatum stuðlum.

## 2.7. Avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar

Uppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar. Men í dag liva Føroyar ikki upp til tær ásetingar, ið eitt nú europeisk lond hava ásett fyri at fremja gjøgnumskygni í politisku skipanini.

GRECO (The Group of States against Corruption) er ein felagsskapur, ið varð stovnaður av Europaráðnum í 1999 fyri at fyribyrja korruptión. GRECO hevur sum endamál at betra møguleikarnar hjá limalondum, sum í løtuni eru 49 í tali, at fyribyrgja og berja niður korruptión. Hetta verður gjørt við leypandi eftirliti og eftirmetingum av, um limalondini lúka tey grundleggjandi krøv, ið sett eru fyri at fyribyrja korruptión. Millum samtyktirnar, ið eru gjørdar av GRECO, er ein, ið hevur við "felags reglur móti korruptión í fígging av politiskum flokkum og valstríði". Í hesi hava londini samtykt at almannakunngera inntøkur hjá politiskum flokkkum, herundir almannakungerð í roknskapi um møguligan privatan stuðul til politiska virksemið.

Um Føroyar luku hesar ásetingar, høvdu Føroyar í størri mun lokið krøv, ið onnur lond í Europa seta sær. Ein óbeinleiðis avleiðing av hesum lógaruppskoti kann sostatt verða ein jalig ávirkan á umdømi Føroya uttanlands, samstundis sum lógaruppskotið fer at tryggja enn størri rættartrygd og gjøgnumskygni í Føroyum.

## 2.8. Avleiðingar fyri upplýsingarskyldu hjá persónum

Uppskotið hevur avleiðingar fyri valevni, ið stilla upp til løgtingsval og kommunuval. Hesi valevni skulu nú upplýsa politiska flokki sínum um, hvønn privatan stuðul tey fáa.

# Kap. 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Greinin ásetir málsøki lógarinnar.

**Til § 2**

Politiskir flokkar skulu leggja fram almennan roknskap, ið fevnir um allar inntøkur floksins. Um flokkurin fær privatan stuðul, ið samanlagt hevur virði á 5.000 kr. ella meira í einum roknskaparári frá sama privata ella dulnevnda stuðli, skal upplýsast serstakt um hetta í roknskapi floksins. Eisini skulu løgtingslimir og valevni, ið stilla upp fyri flokkin til løgtingsval, upplýsa í roknskapi floksins, um tey fáa privatan stuðul, ið samanlagt hevur virði á 3.000 kr. ella meira í einum roknskaparári frá sama privata ella dulnevnda stuðli. Um valevni stillar upp til løgtingsval uttanflokka, ella um løgtingslimur er uttanflokka, og móttaka privatan stuðul, ið samanlagt hevur virði á 3.000 kr. ella meira í einum roknskaparári frá sama privata ella dulnevnda stuðli, skal frágreiðing latast fyrisitingini hjá Løgtinginum um hetta. Stuðul sambært hesi lóg kann vera peningaligur stuðul og/ella stuðul, ið verður veittur við keypi av vørum og tænastum, eitt nú lýsingum, plakatum, útgerð v.m.

**Til § 3**

Roknskaparárið er 1. januar til 31. desember. Floksleiðslan skal undirskriva váttan um, at flokkurin ikki hevur aðrar inntøkur enn tær, ið upplýst er um í roknskapinum. Tá talan er um uttanflokka løgtingslim ella uttanflokka valevni til løgtingsval, undirskrivar viðkomandi valevni ella løgtingslimur frágreiðingina.

**Til § 4**

Roknskapir og frágreiðingar verða latnar fyrisitingini hjá Løgtinginum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir 31. desember. Uppgávan hjá Løgtinginum er bara at tryggja, at almenningurin kann fáa innlit í roknskapir og frágreiðingar, sum eru latnar fyrisitingini hjá Løgtinginum.

**Til § 5**

Teir persónar í leiðslu floksins, løgtingslimir og valevni, ið geva skeivar ella manglandi upplýsingar um inntøkukeldur, verða revsaðir við bót. Eisini kunnu politiskir flokkar, sum juridiskir persónar, áleggjast revsiábyrgd samsvarandi revsilógini.

**Til § 6**

Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 4. november 2019**

Kristina Háfoss